FYLGISKJAL 5

LM-064/2020

Kommunufelagið

13. august 2020

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Okkara j. nr.
Click here to enter text.

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j. nr. 20/00596

Hoyringarsvar til uppskot til broyting í lóg um Húsalánsgrunn (hækkað lániheimild)

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda uppskot, ið er sent felagnum til hoyringar.

Fyrst av øllum skal viðmerkjast, at uppskotið er ikki viðgjørt politiskt av stýrinum fyri Kommunufelagið, tí uppskotið er sent til hoyringar mitt í feriutíð. Kommunufelagið tilskilar sær tí at koma við fleiri viðmerkingum, um hetta verður aktuelt.

Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til, at Bústaðir fær økta lániheimild við tí endamáli at byggja fleiri bústaðareindir.

Kommunufelagið fer tó at koma við fylgjandi yvirskipaðum viðmerkingum til bústaðarpolitisku avbjóðingina.

Sum skilst á almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, er Bústaðir bústaðarpolitiska amboðið hjá landsstýrinum, sum kann fremja ætlanirnar í samgonguskjalinum í verki.

Í almennu viðmerkingunum sæst somuleiðis, at landsstýrið hevur gjørt av, at fer Bústaðir undir verkætlanir í økjum, har grundarlag er fyri kapping, skal hetta vera á javnsettum grundarlagi við atliti til avkastkravi og atgongd til kommunal grundøkir.

Kommunufelagið metir tað vera áhugavert, at landsstýrið ynskir at regulera atgongdina hjá Bústøðum til kommunal grundøkir, men støða tykist ikki at vera tikin til henda spurning í fyriliggjandi lógaruppskoti og tí kundi Kommunufelagið hugsað sær at fingið nærri at vita, hvussu ætlanin er at fremja hetta í praksis.

Tættirnir økt lániheimild, avkastkrav og atgongd til kommunal grundøkir eru allir umrøddir í frágreiðingini um bústaðarpolitisk átøk, sum varð handað landsstýriskvinnunum í vár. Umframt nevndu tættir, eru eisini ein røð av øðrum tættum i frágreiðingini, men enn tað tykist ógreitt, um og hvussu landsstýrið fyriheldur seg til aðrar tættir í frágreiðingini.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

LM-064/2020

Kommunufelagið

Umframt tað, at landsstýrið metir Bústaðir vera bústaðarpolitiska amboðið, ið skal fremja ætlanirnar í samgonguuskjalinum í verki, so eru eisini onnur amboð til at taka, tá bústaðaravbjóðingin skal loysast.

Løgtingið hevur sum lóggávuvald møguleika at regulera fleiri av hesum amboðum, sum nevnd eru í frágreiðingini um bústaðarpolitisk átøk.

Sæð frá einum kommunalum sjónarhorni eru fleiri viðkomandi tættir, ið kundu verið við til at loyst trotið á bústøðum, og talan er bæði um loysnir, ið eru skjótar at seta í verk og aðrar langtíðarloysnir, ið krevja støðutakan, ið somuleiðis er langtíðarhaldbar. Hesir tættir eru m.a. í hvønn mun kommunur kunnu útvega og reka bústaðir, kunnu luttaka í bústaðarverkætlanum annars, kunnu langtíðarleiga undirlendið, kunnu áleggja møguliga bústaðarskyldu, kunnu leggja tænastugjøld á bústaðir, v.m., men eisini aðrir viðkomandi spurningar eiga at verða umrøddir sum møgulig loysn til ávísar bústaðartrupulleikar, sum t.d. skipan við býlisstuðli.

Tað er tó týdningarmikið at hava í huga, at avbjóðingarnar í kommunum kunnu vera ógvuliga ymiskar, og orsøkirnar kunnu somuleiðis vera rættiliga ymiskar, so sum landafrøði, fólkasamanseting, inntøkugrundarlag o.s.fr. Hesi viðurskifti gera seg ikki minst galdandi í avbjóðingini við at skipa bústaðarmarknaðin.

Hóast ymiskar avbjóðingar, so eigur reguleringin av kommunala geiranum at vera soleiðis skipað, at tað er møguligt hjá kommunustýrinum, sum ovasta politiska myndugleika í viðkomandi lokaløki, á tryggum løgfrøðiligum grundarlagi, at gera tær raðfestingar, sum kommunustýrið metir, tænir borgaranum í lokalumhvørvinum best.

Samstundis er týdningarmikið at hava í huga, at tær heimildir sum kommunur hava at virka eftir, tá ræður um at vera við til at føra bústaðarpolitik, bæði eru so smidligar, at tað er møguligt hjá kommunum at luttaka aktivt saman við øðrum viðkomandi aktørum, og samstundis avmarkandi, soleiðis at heimildirnar ikki eru í stríð við aðra lóggávu, sum regulera t.d. kommunala luttøku í vinnuligum virksemi, stuðul til einstaklingar o.t.

Vísandi til omanfyri standandi eftirlýsir Kommunufelagið einum dialogi við landsstýrið um tann leiklut, sum kommunurnar hava og í framtíðini kunnu ella skulu hava í felags avbjóðingini at loysa trotið á bústøðum í Føroyum.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo